# Elsba Hardlai farin

Fríggjadagin 5. februar andaðist Elsba Hardlai í Havn, 70 ára gomul. Elsba er best kend frá mótahandlinum 29 v/Elsbu Hardlai í Tróndargøtu, sum hon rak saman við manninum Jan Hardlai.

Hon var eisini kend undir navninum Elsba í Skotinum, tí hon byrjaði sum sjálvstøðug handilskvinna við mótahandlinum í Skotinum úti á Reyni í 1976.

Í november 1977 læt SMS upp, og har var Skotið til 1984, tá handilin flutti oman í Bringsnagøtu.

Síðan 1990 hevur handilin verið í Tróndargøtu 29 og eitur 29. Elsba og Jan hava arbeitt væl saman øll hesi árini, og handlarnir hava havt sín heilt serliga stíl.

Elsba var dóttir Karolinu, f. Magnussen, úr Saksun, og Mads Andreas Jacobsen (1891- 1944), sum M.A. Jacobsens virðislønirnar eru uppkallaðar eftir. Elsba átti seks børn umframt ommu- og langommubørn.



*Elsba og Jan Hardlai*

# Dennis Knudsen til Føroya




TÍÐINDASKRIV

Síðst í mars kemur danski styling- hår og makeup serfrøðingurin Dennis Knudsen til Føroya.

Dennis hevur egna salong í miðbýnum í Keypmannahavn, og hann stylar nógv av teimum kendu fólkunum í býnum. Hann ger t.d. hárið hjá Mariu, konuni hjá Prins Joachim, hvønn dag.

Fríggjakvøldið 26. mars kl 20.30 hevur hann eitt kvøld fyri privatfólki, bindiklubbum og fyritøkum, og leygardagin 27. mars kl. 16 er tað fyri frisørar, stylistar og kostmelogar.

Tilmelding fer fram á: wellness@wellness.fo

## Prógv

Tann 4. desember 2009, fekk Sjúrður Hammer, Tórshavn, prógv sum lívfrøðingur frá University of Glasgow, við heitinum Master of Research (M.Res) in Marine and Freshwater Ecology and Environmental Management. B.Sc. í Lívfrøði hevði hann frammanundan tilkið á University of Aberdeen.



## Prógv

Hildur Enni hevur tann 29. januar fingið prógv sum professionsbachelor í fysioterapi á Professionshøjskolen Metropol í Keypmannahavn.



Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

## Dagurin

**9. februar. Appolonia**, deyð umleið ár 250. Ein kona í Aleksandriu, sum fyri trúar sakir varð pínd og dripin. Halgisøgan sigur, at hon fekk allar tenninar trektar út og varð síðani brend á báli. Hon er verndarhalgimenni hjá tannlæknum. Navnið er eftir grikska gudinum Apollon, hin ljómandi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*